# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til 6 ára gamalt barn við serligum tørvi í Vág kommunu frá 18. august 2008 til 1. juli 2009.

Stuðulin kemur í samstarvi við Frítíðarskúlan í Vági, Sosialu deild, NSR tænastuna ì Suðuroy og familjuna, at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur hóskandi útbúgving og royndir.

Arbeiðið er 20 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara tlf.37 36 04.

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosiala deild hjá Porkeris – og Vágs Kommunu í seinasta lagi 30 juni 2008 kl.12.00.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
Við Á 8 · 950 Porkeri
Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04
T-post: sosialadeild@email.fo

# EIÐIS SKÚLI

Kolsvegur 8 · Postrúm 29 · FO-470 Eiði
Heimasíða: www.eidisskuli.fo

## Stuðulsfólk til Eiðis skúla

Søkt verður eftir einum ped. stuðulsfólki 20 tímar um vikuna skúlaárið 2008/2009. Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pedagogfelagið. Uppgávan hjá stuðlinum er at arbeiða við børnum við serligum tørvi

**Tann, ið settur verður skal:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- verða við og taka sær av mennandi stuðulsarbeiði
- duga at samstarva við leiðslu, lærarar og foreldur
- verða fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum

Meira kann fáast at vita um starvið frá fyrstalæraranum Tom Joensen á tel. 22 90 45.

Umsóknir skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 15. juli.

Eiðis Skúli
Postrúm 29
470 Eiði

**Eiðis skúli** hevur undirvísing fyri næmingum í 1. – 7. árgangi. Í skúlanum starvast 9 lærarar, 2 stuðlar og 80 næmingar. Les meir um okkum á www.eidisskuli.fo

## Námsfrøðingar til heilsufremjandi bústaðar- og skúlatilboð

Frá 11/8, evt. 1/9, søkja vit eftir 2 námsfrøðingum at arbeiða fulla tíð

Rásin er ein samdøgursstovnur, sum bjóðar eitt 3-ára mennandi skúla- og bústaðartilboð til ung við menningartarni.
Kjarnuuppgáva stovnsins er at gera tey ungu sjálvbjargin, greina arbeiðsevni og menna teirra førleikar at klára seg í arbeiðslívi og frítíð við teimum evnum og avmarkingum, tey hava, eftir lokið skúlaskeið.

Rásin er stovnur undir Mentamálaráðnum, og í løtuni búgva 7 vælfungerandi fólk við menningartarni í aldrinum 28 til 31 ár á stovninum.

**Búfólkini vænta:**
- at tú virðir tey á jøvnum føti við øll onnur
- at tú ert tolin og samstundis ert før/ur fyri at seta neyðug mørk
- at tú ert ein glaður og búgvin persónur, sum íðin tekur lut í virksemi stovnsins

**Vit vænta:**
- at tú hevur praktiskar, námsfrøðiligar royndir við at arbeiða við ungum fólki
- at tú hevur hug at virka sum ein týðilig fyrimynd fyri tey ungu, virkar við til at gera gerandisdagin spennandi og innihaldsríkan og eggjar tey til at liva eitt aktivt lív.
- at tú kanst arbeiða í vælskipaðum kørmum, ert kreativ/ur, reflekterandi og torir at seta spurningar, bæði við arbeiðsháttin hjá tær sjálvum og hjá øðrum
- at tú ert erlig/ur, engagerað/ur, fleksibul, humoristisk/ur og professionell/ur
- at tú hevur umsorgan fyri øðrum og dugir at seta teg í teirra støðu
- at tú møtir væl upp

**Vit kunnu bjóða tær:**
- ein royndan og stabilan starvsfólkahóp við ídnum og dugnaligum starvsfeløgum
- ávirkan
- eitt arbeiðspláss, har tínar fakligu dygdir verða høgt mettar
- ein stovn, sum framhaldandi mennist og broytist
- nøkur spennandi búfólk

Arbeiðstíðin á Rásini er skiftandi við dag- og samdøgursvaktum umframt arbeiði í vikuskiftum. Tað hevur stóran týdning, at tú heldur hetta vera positivt.

**Starvs- og lønarviðurskifti:**
Størvini verða lønt sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag

**Samband:**
Um tú ynskir tú fleiri upplýsingar um títt komandi arbeiðspláss, so kanst tú seta teg í sambandi við Morten Hust Petersen, leiðara, tlf: 215202

**Umsóknarfreist:**
Freistin at lata umsóknir inn er 11/7-2008 kl. 12.00 (setanarsamrøður verða í viku 29).

Skrivlig umsókn saman við avriti av próvskjølum, arbeiðsroyndum v.m. skulu sendast til: Rásin, att: Morten Hust, Heiðavegur 67, FO-600 Saltangará, ella til hesa teldupostadressu: rasin@olivant.fo



# Listaframsýning á ólavsøku

Lions Club Tórshavn skipar aftur í ár fyri listaframsýning í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku.

**Opið verður 27. – 29. juli.**

Hevur tú hug at taka lut í hesi framsýning, set teg í samband við Lions Club Tórshavn á telefon 211470, 243228 ella 312341 áðrenn 21. juli.

Ágóðin av málningaframsýningini fer til eina ráðstevnu um orðblindni, sum verður 12. september 2008 á Hotel Føroyum.

**LIONS CLUB TÓRSHAVN**

# ALT TIMBUR OG SNIKKARAARBEIÐI verður gjørt



**So sum:**
Nýbyggjan
Tilbygging
Umvælingar
Teking
Skifta vindeygu
Klæða hús

Óbindandi tilboð verða givin
**Ring á 58 66 66**

# J. P. TRÆSMÍÐ

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir